# 2.723.000 kr fyri vind í eitt ár

**Longu eftir fyrsta heila roknskaparárið við vindmyllum kann staðfestast, at talan er um lønandi virksemi, sum Sp/f Røkt fór undir í 2003**

ROKNSKAPUR
*Jákup Mørk*

1.503 tkr. Tað var úrslitið hjá Sp/f Røkt í 2004 áðrenn skatt. Sp/f Røkt er felagið, sum eigur og rekur tær tríggjar vindmyllurnar uppi á Mýrum við Vestmanna.

Eftir skatt var úrslitið 1.142 tkr., so tað ber illa til at staðfesta annað enn, at talan er um eina lønandi framleiðslu, sum felagið fór undir á heysti 2003.

Og skal tosast um vindmyllurnar, so hevur vinningurin hjá felagnum verið størri enn so. Felagið hevur eisini havt smoltframleiðslu sum virkisøki, men í ársfrágreiðingini verður sagt, at hetta virksemið í 2004 hevði við sær, at felagið varð noytt at avskriva 700 tkr. Og hartil skal leggjast, at av samlaðu avskrivingunum á 1.657 tkr., stendur smoltstøðin fyri teimum 520 tkr. Við verandi avskrivingarhátti verður smoltstøðin fult niðurskrivað við árslok 2005, og fer hesin parturin soleiðis als ikki at tyngja raksturin eftir hetta.

Tað vil við øðrum orðum siga, at verður raksturin av vindmyllunum tikin fyri seg í roknskapinum, so gevur hesin eitt avlop á 2.723 tkr.

Somuleiðis fer rentubyrðan hjá felagnum at minka, so hvørt sum veðskuldin fyri vindmyllurnar minkar. Lántøkan til íløguna var íalt knappar 13 mió kr., og í 2004 var rentubyrðan av hesum 510 tkr.

Sp/f Røkt hevur 15 ára sáttmála við SEV um keyp av orku frá vindmyllunum uppi á Mýrum.

# Damor byrjar aftur

**Hósdagin letur handilin hjá Damor upp aftur. Handilsbygningurin hjá Damor á Argjum brann í grund herfyri, men nú verður latið upp í leigaðum hølum.**

HANDILSVIRKSEMI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



Síðani herviliga eldsbrunan hevur leiðslan í Damor arbeitt miðvíst fyri, at handilin kundi halda fram við sínum virksemi. Nú er ein loysn funnin, og hósdagin á miðdegi ber aftur til at keypa el-vørur, súkklur og annað frá Damor.

**Fyribilsloysn**

Damor letur upp í leigaðum hølum á Sandvíkarhjalla í bygninginum hjá Poul Mohr. Talan er um gamla bygningin hjá Farpack beint við síðuna av bygninginum hjá Litaval.

Stjórin í Damor, Per Mortensen, sigur, at tað hevur gingið rímuliga væl við at koma í gongd aftur við virksemi hjá handlinum. Nýggju hølini eru 960 fermetrar til støddar, og tað er eini 3-400 fermetrar minni enn gomlu hølini á Argjum. Hetta heldur Per Mortensen tó ikki fer at merkjast, tí á Argjum var talan um fleiri hæddir, meðan í nýggju hølunum er alt í eini hædd.

- Allir mans hava arbeitt frá tíðliga á morgni til seint á kvøldi fyri at fáa tað at bera til, og eg kann ikki siga annað, enn at her er veruliga talan um eitt lið av starvsfólkum, ið stendur saman og ger tað møguligt at lata upp aftur so skjótt, sigur Per Mortensen.

Stjórin í Damor sigur, at hóast tað var ein øgiligur skelkur, at gamli handilin brann í grund, so hevur tað eisini verið rættuliga spennandi at byggja alt upp aftur, men hann leggur eisini afturat, at nýggju hølini bert eru ein fyribilsloysn.

Per Mortensen sigur, at hóast teir hava roynt at bílagt allar vørur, ið vóru á goymslu á Argjum, so vilja tað tó altíð verða onkrir smálutir, ið mangla. Tí er tað ikki óhugsandi, at um onkur hevur keypt eina súkklu frá Damor, og súkklan skal til umvælingar, at onkur eykalutur noyðist at bíleggjast úr Danmark.

Undan eldsbrunan á Argjum hevði Damor eisini eina deild í Álakeri, men hendan deildin verður nú eisini flutt niðan á Sandvíkarhjalla, so at alt virksemið hjá Damor verður savnað í einum bygningi. Nýggi handilin hjá Damor letur upp hósdagin klokkan 13.

# Vit forða ikki bíligari orku

**Stýrisformaðurin í SEV, Leivur Hansen, vísir aftur, at elfelagið setur fót fyri bíligari orku í Føroyum. Hann vísir á, at ætlanin hjá Sp/F Røkt í Vestmanna um at seta fleiri vindmyllur upp og framleiða bíligari orku ikki er so einføld, sum vestmenningarnir vilja verða við**



ORKUFRAMLEIÐSLA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Leivur Hansen sigur, at SEV hevur longu samstarv við Sp/F Røkt, og at hetta samstarv fyribils er galdandi fram til 2015. Ætlanin um at seta fleiri vindmyllur upp er ikki partur av hesum samstarvi, sigur stýrisformaðurin í SEV.

**Verður ivaleyst umrøtt seinni í ár**

Serfrøðingarnir hjá SEV kannaðu ætlanirnar hjá Røkt, og teirra niðurstøða var tann, at ætlanin ikki var 100 prosent í lagi, millum annað tí at talan í ávísan mun er um ein heilt nýggjan hátt at útvinna orku uppá, greiðir Leivur Hansen frá.

Leivur Hansen vísur tó ikki aftur, at talan kann gerast um eitt økt samstarv millum SEV og Sp/F Røkt:

- Sum er loyva viðtøkur hjá okkum ikki hesum, og harumframt hava vit eina viðtøku hangandi oman yvir okkum um, at vit skulu fara undir Eiði 2 ætlanina. Hetta er ein ætlan, sum umboðsráðið hevur samtykt, og hon kann ikki bara soleiðis skúgvast til viks. Ætlanin er komin langt, og vit bíða bert eftir, at friðingarmyndugleikarnir og Sunda Kommuna eru liðug at viðgerða málið, greiðir Leivur Hansen frá.

- Um vit skulu í tættari samstarv við Røkt, so krevur tað, at umboðsnevndin góðkennir tað. Seinni í ár verður tann sonevndi heystfundurin hjá umboðsnevndini, og hvat tá hendir, veit eg ikki, men ivaleyst verður málið umrøtt á fundinum, sigur stýrisformaðurin.

**Hava áhuga í nýggjum orkuvegum**

Leivur Hansen vísir aftur, at SEV ikki hevur áhuga í at leita eftir nýggjum orkuvegum, og hann nevnir í hesum sambandi, at SEV er við í granskingarætlan, har endamálið er at finna út av, um tað er lønsamt at framleiða streym úr alduorku. Eisini er SEV við í einum samstarvi við grønlendingar og íslendingar um sólorku, greiðir Leivur Hansen frá.

- Tað ræður um at finna aðrar alternativar orkuvegir. Serliga í hesum døgum nú oljan er so dýr, er tað ógvuliga umráðandi at finna aðrar loysnir, og tí fylgja vit væl við í, hvat hendir á teimum ymsu orkuøkunum, og vit vita eisini, at serliga vindorkan er áhugaverd, sigur Leivur Hansen at enda.

# Prutlini eru bert til EIN persón

FERÐSLA



**Prutl:** Sum nevnt á síðu 7 so verður ferðslulógin rættiliga herd eftir 1. september.

Hesar broytingar raka fyrst og fremst bilførarar, men tey yngru, sum koyra á prutli, verða eisini rakt av hesum.

Ein tann størsta broytingin er hon, at frá 1. september kann bert førarin sjálvur sita á einum prutli.

Tað verður sostatt ólógligt at hava ferðafólk sita á prutlinum undir koyring.

Verður ein prutlførari tí tikin við ferðafólki á, so verður hetta revsað við bót.

**sb.**

Daewoo Leganza 2.0 CDX



Leðursetur, el-innstilling av førarasetri, servostýring, fjarstýrt sentrallás, el-rútar, el-spegl, el-sóltak, klimaanlegg og cd-spælara.
Ein luksusbilur í sera góðum standi.

- Árg. sep- 1999
- Km. 78.000
- Nýggj píkadekk á eyka felgum.
- Prísur einans: *Kr. 98.600,-*

Um eingin bilur er í býti, verður STÓRUR avsláttur latin

P/f Esmar Simonsen
KAMBSDALUR · TEL 44 44 05 · 22 23 24 · WWW.ES.FO